## Spanskur fóbóltur á Rás1



Fótbóltur, action-filmar og kampítróttur og annað mannfólkatilfar verður helst skjótt at síggja á Rás 1. Samtakið kring TvDanmark, SBS-TV, byrjaði 1. januar við nýggjari rás ætlað monnum. Sambært Televarpinum, hava tey enn ikki tikið støðu til, um tey fara at senda nýggju rásina fast. Men í fyrsta umfari fara tey at senda tilfar frá Kanal6 á Rás1. Eisini fara tey at senda spanskan fótbólt frá bæði Primera Divisione og Copa del Rey á Rás 1. -Men, skulu vit senda Kanal 6 fast, so mugu vit strika onkra aðra rás. Og tað mugu vit nú taka støðu til, sigur Laila Hentze, stjóri í Televarpinum.

## Obama loyvir kuba-amerikanarum heim á vitjan

Framyvir sleppa kubaamerikanarar at vitja teirra kæru heima á Kuba. Undir einari hoyring í senatinum týsdagin segði Hillary Clinton, senatorur, at Obama-stjórnin ætlar at strika ferðaforboðið, sum hevur forðað kubanskum familjum í USA at vitja familjuna í heimlandinum. Sambært Clinton, heldur Obama at kuba-amerikanarar eru bestu umboðsfólkini fyri fólkaræði, frælsi og fríum marknaðarbúskapi. Clinton segði seg vóna, at stýrið í Havana fer at loyva kubansku familjunum innfararloyvi, skrivar Kristeligt Dagblad.



# Katastrofal støða á Setrinum

**Fróðskaparsetur Føroya er á aldur við universitetið í Ålborg. Men í mun til javngomlu universitetini, fær Fróðskaparsetur Føroya ikki sama stuðul frá landinum, sum Ålborg, og skal í staðin spara fimm milliónir. -Hetta er katastrofalt fyri Fróðskaparsetur Føroya. Eingin fer at vilja søkja til Føroya eftir hetta, sigur rektarin, Jóan Pauli Joensen**

ÚTBÚGVING
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Í morgin hevur nýsetta stýrið á Fróðskaparsetri Føroya fund. Tá vera tær prinsipiellu avgerðirnar tiknar viðvíkjandi sparingum, sum Fróðskaparsetur Føroya skal fremja. Fimm milliónir er álagt teimum at spara, og merkir hetta at 8-9 fólk mugu sigast úr starvi, alt eftir hvørja deild sparingarnar fara at ganga útyvir.

- Vit hava sett fólk í starv á deildunum, sum eru lærarar aðra staðni frá, og hendir tað, at vit noyðast at siga hesum fólkunum upp aftur, verður støðan katastrofal. Onnur orð havi eg ikki fyri hesi støðuni, sum nú er íkomin, sigur Jóan Pauli Joensen.

Rektarin greiðir frá, at av tí at fíggjarlógin var so sein á veg hesa ferð, er ikki roknað við teimum útreiðslum, sum fylgja við nýsettu størvunum. Samstundis hevur mentamálaráðið góðtikið allar starvssetanir, og er sjálvt uppskotið komið haðani.

– Nú stendur øll virðingin fyri Fróðskaparsetri Føroya fyri falli. Ongantíð fyrr havi eg verið so skuffaður av politisku skipanini, sigur Jóan Pauli Joensen.

Samstundis sigur rektarin á Fróðskaparsetri Føroya, at alt arbeiðið, sum MFS hevur gjørt við at fáa føroyingar heim at lesa, dettur á gólv við eini slíkari avgerð.

### Dreymar kvaldir í føðingini

Fróðskaparsetur Føroya er at meta við Ålborg Universitet, Syddansk Universitet, Roskilde Universitetscenter, Odense Universitet og Universitetið í Tromsø í aldri. Dreymurin er at byggja út Fróðskaparsetrið til ein stóran útbúgvingarstovn, men sambært Jóan Paula Joensen, hevur arbeiðið við setrinum gingið ótrúliga spakuliga. Tann 1. August 2008 vóru Læraraskúlin og Sjúkrarøktarfrøðiskúlin lagdir saman við Fróðskaparsetri Føroya, og verður stýrið fyri stovnin sett í morgin. Fyrsti fundur í stýrinum verður beint eftir setanina, har mentamálaráðharrin verður til staðar.

- Eg vóni, at Helena Dam á Neystabø fer at leggja fram eitt uppskot til broyting í fíggjarlógini fram fyri Løgtingið.

Um størri játtan ikki kann fáast til Fróðskaparsetur Føroya, sum er ein vaksandi útbúgvingarstovnur, verða ætlanirnar um at byggja út Fróðskaparsetur Føroya, kvaldar í føðingini, heldur rektarin.

– Samanborið við hini universitetini, vit kunnu samanbera okkum við, eru vit ongan veg komin. Vit mugu menna okkum, og hugsa um annan ídnað. Eitt nú útbúgvingar innan medisin, skuldu vit bjóðað. Gransking í samfelagsvísindum, lóg. Fiskurin skal hava eina søgu, fyri at vit kunnu selja hann, sigur Jóan Pauli Joensen.

– Vit skulu framleiða vitan og kunnleika. Við tað at vit hava tað føroyska málið, ger tað okkum sterkari. Tí tá hava vit okkara egna samleika.



*– Støðan er einki minni enn katastrofal á Fróðskaparsetri Føroya í løtuni. Virðingin fyri Fróðskaparsetri Føroya stendur fyri falli, og avleiðingarnar vera at útlendskir umsøkjarar í framtíðini fara at lata vera við at søkja til Føroya, heldur Jóan Pauli Joensen, rektari*

*Savnsmynd*